# Á fjalli

Í gjár vóru teir á fjalli fyri handan Dal.

Abbi, sum er seyðamaður, vakti okkum í lýsingini, og so fóru vit niðan á Dal.

Tá ið vit komu oman Líðina við gonguni, mundu fleiri seyðir sloppið undir Hamrinum, men Jákup og Óli runnu fram um seyðirnar og fingu vent teimum. Eg skuldi fara við teimum, men eg gleið og datt so langur, sum eg var. Eg mundi dottið í eina djúpa grøv. Tað hevði verið verri. Men eg fekk ikki ilt; eg bara dálkaði meg eitt sindur.

Abbi fletti fýra lomb. Og lítli beiggi fekk allar bløðrurnar.

*Jeffrei Henriksen*

